# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 30. januar 2013, kl. $19^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 3**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um sølu av skrivstovubygninginum á Fitjum.
J.nr. 2009-522

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 22. januar 2013 málið um skrivstovubygningin á Fitjum, sum Bygdarráðið á fundi 18. oktober 2012 samtykti at selja, um hóskandi boð fæst.

Nevndin mælir til at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini soleiðis, at hóskandi øki undir og rundan um bygningin verður broytt til sethúsaøki. Nevndin mælir somuleiðis til at frábýta neyðugt lendi.

**Viðv. 3**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 4**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Hjartvard Kjærbæk um byggiloyvi til bygning til smáídna á matr. nr. 64a.
J. nr. 2005-182 og 2009-472

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 22. januar 2013 umsókn frá Hjartvard Kjærbæk um byggiloyvi til bygning til smáídna á matr. nr. 64a.

Kærunevndini í Lendismálum hevur heimvíst málið til nýggja viðgerð hjá Vestmanna Kommunu. Avgerðin verður grundað á, at kommunan ikki hevur hoyrt grannarnar, áðrenn loyvi varð givið til at byggja nærri grannamarki enn 2,5 metrar. Vísandi til avgerðina hjá Kærunevndini varð málið viðgjørt av nýggjum.
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 4**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 5**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um játtan til máltíð í samband við EBG 2013.
J.nr. 2009-541

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 22. januar 2013 umsókn frá Fiskivinnuskúlanum, har heitt varð á Vestmanna Kommunu um at bjóða døgurða tann 2. juli 2013 í sambandi við at luttakararnir til European Business Games 2013 koma til Vestmanna tann dagin.

Nevndin samtykti at leggja málið fyri bygdarráðið til støðutakan, treytað av at tilboð um máltíðina er innkomið áðrenn bygdarráðsfundin.

**Viðv. 5**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skjeyt upp, at samtykkja at stuðla við matinum til dagin, treytað av at skúlin átekur sær servering, uppvask o.a.
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 6**
Tilmæli frá umsitingini um setanarbrøk borgarstjórans
Vísandi til § 6, stk. 2 í kommunustýrislógini skal kommunusyrið áseta setanarbrøk borgarstjórans til antin 1/2 ella 1/1.
Umsitingin mælir Bygdarráðnum at seta setanarbrøk borgarstjórans til 1/1, og at setanarbrøkurin verður ásettur í stýrisskipanini fyri Vestmanna Bygdarráð.

**Viðv. 6**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 7**
Persónar, sum saman við borgarstjóranum skulu hava heimild til at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.
J.nr. 2009-031

Umsitingin mælir til at geva Karl A. Olsen, varaborgarstjóra, og Maud Poulsen, kommunuskrivara, heimild til saman við Paula T. Petersen, borgarstjóra, at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.

**Viðv. 7**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 8**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um val av grannskoðara hjá Vestmanna Kommunu.
J.nr. 2009-499

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. januar 2013 málið um, at grannskoðanarvirkini P/F Nota og P/F Inpact hava lagt saman og stovnað nýtt felag, Januar.
Í hesum sambandi skal støða takast til, um Grannskoðanarvirkið Januar framyvir skal vera grannskoðari hjá Vestmanna Kommunu.

Nevndin mælir til, at nýstovnaða grannskoðarafelagið Januar framyvir verður grannskoðari hjá Vestmanna Kommunu.

**Viðv. 8**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 9**
1. viðgerð av uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013.
J.nr. 2009-499

**Viðv. 9**
Uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013 varð lagt fram til 1. viðgerð.

Bókin Lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen